# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341871

**Gudstænastur**
**3. sunnudag e. Trinitatis**
***Havnar kirkja:*** k. 11.00, Sonja Klein
***Eiði:*** kl. 11.00 Norðurlendsk hámessa, Magnus B. Jørgensen, Cand theol. og Emil Olsen.
***Fuglafjørður:*** kl. 11.00 Uni Næs.
***Fríðrikskirkjan: Mikukvøldið 28. juni*** kl. 20.00. Konsert við Aldubáruni.
***Gøtu kirkja: Fríggjadagin 30. juni*** kl. 20.00 Konsert við floytu og klaver.
***Gøtu kirkja:*** sunnudagin kl. 11.00 Hanne Sander.

**Fríkirkjan Oasan**
**Kirkjustræti 4**
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti. Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Samkoman v/ Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv. 75*
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønar/ uppbyggingarmøti.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Týskvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.
Fríggjadagin kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Einki morgunmøti sunnudagin vegna møti í Kelduni; um viðrar verður útimøti á Vaglinum við »Atlantic Bike Meet« kl. 21.00, um tað ikki viðrar, verður møti við »Atlantic Bike Meet« inni kl. 18.00.
www.gospel.fo

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin kl. 10.30 Famijumøti har Elsa Húsgarð tosar um arbeiði í Japan.
Kl. 11.30 Samfelagsløta við drekka, kl. 12.00 Tilbiðjunarmøti har Ólavur Jøkladal luttekur. Barnaansing er undir møtinum.
Sunnudagsskúlin er kl. 12.00.
www.livdin.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
Mikudagin kl. 20.00 í KFUK: Fundur, vit halda føðingardag. Inngangur við Sólbjørg Símunarson, Ten-sing kórið syngur. Øll eru vælkomin.

**Katolska Kirkjan**
Týsdagin 27. juni: Fyri tey sum lesa »True Life in God« (Vassula Ryden) »Satt lív í Guði«. Bønarløta verður síðsta týskvøld í hvørjum mánaði kl. 19.30 í Mariukirkjuni.
www.katolsk.fo

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í morgin kl. 6.00 Morgunbøn.
Mikudagin kl. 6.00 Morgunbøn, kl. 17.00 Tímabøn.
Hósdagin kl. 6.00 Morgunbøn.
Fríggjadagin kl. 6.00 Morgunbøn, kl. 20.00 Ungdómsmøti.
leygardagin kl. 17.00 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 10.45 Morgungudstænasta - Alex O'Campo talar.
www.filadelfia.fo

**Meinigheitshúsið**
Týskvøldið kl. 20.00 Bíbliutími, Matt. 13, 24-44.
Sunnukvøldið kl. 18.00 Felags møti við Kirkjuliga Missiónsfelagnum í Vesturkirkjuni. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Ebenezer**
Mikudagin kl. 20.00 Bønar- og uppbyggingarmøti, Sonni Poulsen luttekur, evni: Ápostlasøgan.
Leygardag kl. 20.00 Ungdómsmøti - Møti er í Ebenezer.
Sunnudag kl. 10.00 Breyðbróting, kl. 18.00 Evangel. møti. www.ebenezer.fo

**Hebron, Argir**
Mikudagin kl. 20.00 Bønarløta.
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing. Á møtinum talar Djóni Thomassen.
Sunnudagsskúlin er farin í summarfrí. www.hebron.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Í summarhálvuni hava vit onki morgunmøti.
Kvøldmøti hvønn sunnudag kl. 18.00. Øll eru vælkomin.

**Filadelfia, Miðvágur**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 22.00 Morgunmøti.

**Missiónshúsið Libanon, Sørvágur**
Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti við Bjørg, Hendrik og Tórur.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Mánakvøldið kl. 20.0 Ungdómsmøti hjá Dávid og Theresu, Toftir.
Mikukvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.
Sunnudagin kl. 18.00 Møti.
Øll hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Fríggjadagin kl. 13.00: MC-stevnan verður sett.
Leygarkvøldið kl. 21.00 Konsert.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti við Kornelius Novak. Vælkomin í Kelduna.

**Missións og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bíbiltími.

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa í kvøld kl. 19.30. Páll á Lakjuni talar.
Evni: Í hesum HM-tíðum. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikudagin kl. 20.00 Bíbliutími, Kol. 2. kap.

**Heimamissiónin**
hevur møtir og útimøtir í Suðuroynni frá hósdegnum 29. juni til týsdagin 4. juli.
Hósdagin 29. juni kl. 13.00 Bíbliuundirvísing í Vesturhøll í Fámjin, kl. 19.30 Útimøti í Sandvík og kl. 21.00 Útimøti í Hvalba.
Fríggjadagin kl. 13.00 Bíbliuundirvísing í Vesturhøll í Fámjin, kl. 19.30 Útimøti í Lopra og kl. 21.00 Útimøti í Sumba.
Leygardagin kl. 14.00 Útimøti í Øravík og kl. 20.00 Evangel. møti í Vesturhøll í Fámjin.
Sunnudagin kl. 12.00 Gudstænasta við altarg., v/ Jónsvein Bech, presti og kl. 18.00 Evangel. møti í Vesturhøll í Fámjin.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Teldupostur:
tilhald@torshavn.fo
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
***Mánadagin 26. juni***
kl. 10.00-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14.00-17.00 Kortspæl, telving, landastrok, telving, dart og onnur spøl
***Túrur til Suðuroyar við nýggja Smyrli 29. juni. Úr Havn kl. 10.00 og av Tvøroyri kl. 15.30. Kostnaður 230,- Gjaldast í seinasta lagi týsdagin***
***Týsdagin 27. juni***
kl. 10.00 Sangur. Óli Vang. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 12.00-17.00: Opið hús
***Mikudagin 28. juni***
kl. 10-12.00: Handverk. Vegleiðing er á staðnum
kl. 12.00: Vit eta egnan matpakka
kl. 12.00-17.00 Opið hús
***Hósdagin 29. juni***
***Tilhaldið stongt.*** Túrur til Suðuroyar við nýggja Smyrli úr Havn kl. 10.00 og av Tvøroyri kl. 15.30. Døgurði umborð. Møguleiki er at fara busstúr í Suðuroynni.
***Fríggjadagin 30. juni***
kl. 10-17.00: Opið hús
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Tilhaldið á Toftum**
*Tlf. 448690*
*Vit halda til í niðaru hædd á Vesturskin.*
*Teldupost: tilhaldnes@post.fo*
Opið er týsdag, mikudag og hósdag. Frá kl. 15.00 – 18,00
***Týsdag:***
kl. 15.00 Vit syngja úr Føroya fólks. Listin liggur í Tilhaldinum at melda til bowling.
***Mikudag:***
Kl 15,00 Fara frá Tilhaldinum til Lorvíkar at bowla
***Hósdag:***
Stongt.
***Tilhaldið fer í summarfrí og byrjar aftur í september. Lýst verður nærri.***
*Vit hava hvønn dag ein góðan drekkamunn, eins og vit hava nógv spøl, og annað ítriv.*
*Vit ynskja at øll kenna seg væl og hugnað sær.*

**Dagtilhaldið Fløvi**
*Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum.Tlf. 448279.*
Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið er mánadag til fríggjadag kl. 15-18.
***Frá mánadegi 19. juni verður farið í summarfrí.***
***Vit byrja aftur mánadagin 4. september. Gott summar.***
*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl og bøkur. Tú ert vælkomin at hava títt egna hondarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
er opið mánadag og mikudag frá kl 13 til 17. báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. eisini eru bløðini til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin.
***Mikudagin 28. juni***
Vit hugna okkum í Tilhaldinum. Hetta er seinasti dagur áðrenn summarfrítíðina.

**Frá Dagtilhaldinum á Strondum**
Dagtilhaldið er opið hvønn týsdag og hósdag frá 15-18.

**Dagtilhaldið í Luffustovu, Fuglafjørður**
*Opið er týs-, miku- og hósdag frá kl. 15.00-18.00*
***Týsdag***
Kort og onnur spøl.
***Mikudag***
Ítriv: silvurarbeiði og annað
***Hósdag***
Fimleikur
*Hvønn dag drekka við nýbakaðum.*

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
Opið er:
Mánadag og mikudag kl. 13.30-17.30.
Týsdag og Hósdag kl. 9.30-17.30
Teldupostur:
dagtilhaldid@post.olivant.fo
***Mánadag***
Tilmeldan til døgurða týsdag áðrenn kl 17.00 á tlf. 459091
***Týsdag***
kl. 9.30 Gongutúrur
kl. 11.00 bløðini verða lisin fyri sjónveikum
kl 12.00 Døgurði
***Mikudag***
kl. 13.30 Telda
***Hósdag***
kl. 10.00 fimleikur
kl. 11.00 telda
kl. 13.30 bløðini verða lisin fyri sjónveik
*Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks.*
*Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a.*
***Hvør dagur endar við andakt og sangi.***
***Øll eru hjartaliga vælkomin.***

**Eldrafelagið Nón**
Í vetur koma vit saman til handaligt arbeiði hvønn týsdag frá kl. 15.00 til 18.00.

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Frits Jacobsen, tlf. 332053 ella ein av nevndarlimunum.

# V4
## Dráttur nr. 1642, tann 24. juni 2006

21 - 22 - 24 - 27 - 29 - 33 - 42 - 57 - 58 - 59 - 61 - 63 - 64 - 66 - 76 - 77

**Ongin vinnari**

Vinningurin er fluttur til næsta drátt.

**Eykavinningur**
Seðlarnir í kvøld eru eisini við í ólavsøkuspælinum, har eykavinningurin er 5.000 kr. um mánaðin í eitt ár. Drigið verður hóskvøldið 27. juli.

**Silvurbrúdleyp**
18. juli hava Petsy og Thormóð Nielsen, Skopun, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin 15. juli kl. 19.00 í Samljóð. Tey, ið vilja gleðast saman við silvurbrúðarparinum, verða biðin um at siga frá í seinasta lagi 28. juni á tlf. 361630 ella 222665.

Týsdagin 25. juli hava Maureen og Petur Hammer, Tvøroyri, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í høllini í Trongisvági leygardagin 22. juli 2006 kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 10. juli á tlf. nr. 371637 og 284037.

Mánadagin 31. juli hava Henny og Óli Karl Olsen, Klaksvík, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18.00 sama dag. Tey, ið ynskja at gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 20. juli á tlf. 456719 ella 227322.

**Brúdleyp**
Fríggjadagin 30. juni giftast á Rhodos Óluva Reinert, Tórshavn og Sean Kehoe Kork í Írlandi. Brúdleypsadr.: Avra Beach Resort Hotel, Rhodos.

Fríggjadagin 30. juni kl. 15.00 giftast í ráðhúsinum í Tórshavn, Brynhild undir Kletti Johansen og Ragnar Gunnarsson Guttesen, bæði úr Tórshavn. Veitslan verður kl. 20.00 fyri innbodnum.

Leygardagin 1. juli giftast í kirkjuni í Vrå Charlotte Andersen úr Vrå og Rani Ellingsgaard úr Havn. Veitslan verður fyri innbodnum í Den Gamle biograf. Nygade 4-6, 9760 Vrå.

1. juli giftast Jacobina Norðberg Petersen og Martin André Assentoft í Sankt Markus kirkjuni á Frederiksberg. Brúdleypsadr.: Frodesvej 28, 2880 Bagsværd.

Leygardagin 1. juli kl. 13.00 giftast í Havnar kirkju Tórunn Sjóvará Poulsen, Tórshavn og Øssur Joensen, Skopun. Døgurði verður á Hotel Hafnia fyri innbodnum. Kl. 19.00 verður opið hús í Gortrugøtu 26, 188 Hoyvík.

Leygardagin 8. juli kl. 16.00 giftast í Vesturkirkjuni, Rókur Tummasarson, Tvøroyri og Kristín Baldvinsdóttir, Akureyri. Veitsla verður í AB-húsinum fyri innbodnum.

Leygardagin 15. juli kl. 15.00 giftast í Nordfjoreid kirkju í Noregi, Heidi Beate Rviksæter og Thomas Poul Reines Hals, sonur Elsebeth Reines úr Fuglafirði og Per Eirik Hals. Brúdleypsadr.: Rviksæter 6776 Skjølsdalen, Norge.

Leygardagin 22. juli kl. 15.00 giftast í Havnar kirkju, Dorthe Pedersen og Súni Christiansen, bæði úr Tórshavn. Veitslan verður fyri innbodnum í samkomuhøllini í Føroya Studentaskúla í Hoydølum kl. 19.00.

Hósdagin 27. juli kl. 17.00 giftast í Vesturkirkjuni Sólgerð Viderø, Tórshavn og Jørn Ellingsen Reipå, Norra. Veitslan verður í B36-húsinum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 1. juli á tlf. 316832, 596832, 310210, 0047 47235944, 0047 91121330.

Leygardagin 19. august kl. 14.00 giftast í Vesturkirkjuni Randi Fríðvør Poulsen, Tórshavn, og Sigurd Hentze, Skopun. Veitslan verður í HB-húsinum kl. 19.00. Tey, sum vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 20. juli á tlf. 322206 ella 222137.

**50 ár**
Sunnudagin 2. juli verður Jónfríð Jacobsen, Tórshavn, 50 ár. Tey, ið ynskja at heilsa uppá Jónfríð eru vælkomin í høli hjá Starvsmannafelagnum, J. H. Schrødersgøta 9, leygardagin 1. juli frá kl. 19.00.

**Prógv**
23. juni tók Tórstein Christiansen, Skálavík, prógv sum Serviceøkonom á HRS í Keypmannahavn.